

www.oljan.fo

**Jan Müller** 05 - 11 - 2012

# Nógv gull í Suðurgrønlandi

Í Grønlandi hevur felagið NunaMinerals funnið eitt øki afturat við gulli í Jokums Shear nærhendis Nanortalik, og sambært felagnum váttar hetta metingina um, at ein stór lind við gulli er í Suðurgrønlandi. Niðurstøðan hjá NunaMinerals er, at saman við boringunum í Vagnar-verkætlanini í ár prógvar tað nýggja fundið, at møguleikarnir at útvinna munandi nøgdir av gulli í Nanortalik-umráðnum eru góðir. Sagt verður, at jarðfrøðin í umráðnum minnir nógv um jarðfrøðina í verandi gullnámum í Norðuramerika. Spennandi verkætlanir Í ár eru 36 royndir tiknar í einum øki, sum er hálvan annan kilometur langt og millum 650 metrar og ein góðan kilometur breitt. Málið var at fáa staðfest lindina við gulli, og royndirnar góvu meiri enn 9,3 gram av gulli fyri hvørji tvey tons av gróti. -Okkara gullverkætlanir í Suðurgrønlandi eru sera spennandi. Borgingarnar fyrr í ár eydnaðust stak væl og góvu eina góða mynd av lindum við gulli, sigur stjórin í NunaMinerals, Ole Christensen. Hann leggur afturat, at tað seinasta fundið vísir, at talan er um eina breiða ál við gulli í Suðurgrønlandi. Jokums Shear lá fyrr undir ísi, men veðurlagsbroytingarnar hava gjørt, at nú er eingin ísur eftir, og tí ber til at kanna, hvat er niðri í jørðini. Økið er partur av Hugin-loyvinum, sum NunaMinerals eigur einsamalt.